**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 195/2010: Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri mai 2011**

Landsstýrið hevur lagt málið fram tann 11. mai 2011, og eftir 1. viðgerð 12. mai er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 18., 24. og 27. mai 2011.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Ein samd nevnd leggur fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

# § 2. Løgmansfyrisitingin

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **2.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 11.1.02. Løgmansskrivstovan (Rakstrarj.) | J: | 8.147 | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |

# § 3. Fíggjarmál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **3.15.1. Fíggjafyrisiting v.m.** | | | |
| 15.1.04. TAKS (Rakstrarj.) | J: | 66.210 | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |
| 15.1.23. Umsiting av ogn og skuld landsins (Rakstrarj.) | J: | 1.274 | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |

# § 6. Vinnumál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **6.37.1. Ymsar útreiðslur** | | | |
| 37.1.07. Sáttmálaeftirlit (Rakstrarj.) | J: | 63 | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |
| 37.1.18. Skráseting Føroya (Rakstrarj.) | J: | 0 | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |

# § 12. Almannamál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **12.21.1. Fyrisiting** | | | |
| 21.1.04. Almannastovan (Rakstrarj.) | J: | 38.154 | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |

# § 15. Innlendismál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **15.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 11.1.39. Innlendismálaráðið (Rakstrarj.) | J: | 10.330 | - |
| | **EYJ:** | **500** | **-** |

Har umframt hevur nevndin býtt seg í fimm meirilutar og fimm minnilutar

**Ein meiriluti** (Jørgen Niclasen, Magni Laksáfoss, Eyðgunn Samuelsen, Bjørn Kalsø, Tórbjørn Jacobsen og Annita á Fríðriksmørk) leggur fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

## § 6. Vinnumál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **6.37.2. Ymiskur studningur** | | | |
| 37.2.04. Endurgjald til skipasmíð (Stuðulsj.) | J: | 500 | - |
| | **EYJ:** | **509** | **-** |

**Ein minniluti** (Bill Justinussen) leggur fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

## § 6. Vinnumál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **6.37.2. Ymiskur studningur** | | | |
| 37.2.04. Endurgjald til skipasmíð (Stuðulsj.) | J: | 500 | - |
| | **EYJ:** | **809** | **-** |

**Ein meiriluti** (Magni Laksáfoss, Bill Justinussen, Tórbjørn Jacobsen og Annita á Fríðriksmørk) leggur fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

## § 6. Vinnumál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **6.38.2. Samferðsla** | | | |
| 38.2.01. Strandfaraskip landsins (Rakstrarj.) | J: | 125.146 | - |
| | **EYJ:** | **5.000** | **-** |

**Ein meiriluti** (Jørgen Niclasen, Bill Justinussen, Magni Laksáfoss, Tórbjørn Jacobsen) leggur fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

## § 7. Mentamál

| | | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **7.23.2.** | **Fólkaskúlin v.m.** | | | |
| 23.2.01. | Fólkaskúlin (Rakstrarj.) | J: | 280.101 | - |
| | | **EYJ:** | **0** | **-** |

**Ein minniluti** (Jørgen Niclasen, Bjørn Kalsø, Bill Justinussen) leggur fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

## § 7. Mentamál

| | | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **7.23.6.** | **Hægri útbúgvingar og gransking** | | | |
| 23.6.16. | Fróðskaparsetur Føroya (Rakstrarj.) | J: | 70.477 | - |
| | | **EYJ:** | **0** | **-** |

**Ein meiriluti** (Jørgen Niclasen, Bjørn Kalsø, Magni Laksáfoss, Tórbjørn Jacobsen og Annita á Fríðriksmørk) leggur fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

## § 7. Mentamál

| | | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **7.24.1.** | **Ymsar útreiðslur** | | | |
| 24.1.22. | Miðlaráðið (Rakstrarj.) | J: | - | - |
| | | **EYJ:** | **0** | **-** |

**Ein meiriluti** (Jørgen Niclasen, Bjørn Kalsø, Magni Laksáfoss, Bill Justinussen, Tórbjørn Jacobsen og Annita á Fríðriksmørk) leggur fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

## § 11. Heilsumál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **11.11.1.** | **Fyrisiting** | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.1.24. Heilsumálaráðið (Rakstrarj.) | J: | 10.491 | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |

**Ein minniluti** (Magni Laksáfoss og Tórbjørn Jacobsen) leggur fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

# § 11. Heilsumál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **11.20.4. Viðgerðarstovnar** | | | |
| 20.4.02. Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (Rakstrarj.) | J: | 5.030 | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |
| 20.4.03. Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið (Rakstrarj.) | J: | 5.030 | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |

**Ein minniluti** (Jørgen Niclasen, Magni Laksáfoss og Tórbjørn Jacobsen**)** leggur fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

# § 11. Heilsumál

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **11.21.3. Barnastuðul** | | | |
| 21.3.12. Gigni - heilsufrøði fyri børn & ung (Rakstrarj.) | J: | 11.105 | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |

**Ein minniluti** (Jørgen Niclasen, Bjørn Kalsø og Bill Justinussen) leggur fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

# § 20. Inntøkur

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **20.52.2. Avgjøld og tollur** | | | |
| 52.2.15. Avgjald á fiskatilfengi | J: | - | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |
| **20.52.3. Ymsar inntøkur** | | | |
| 52.3.05. Uppboðssøla av fiskatilfengi | J: | - | - |
| | **EYJ:** | **0** | **-** |

Harumfram hevur **Bill Justinussen** hesar viðmerkingar:

6.37.1.18. Skráseting Føroya
Minnilutin heldur ikki, at landið fær nakað burturúr, at kanning av viðurskiftunum í Eik Grunninum verður sett í verk. Eik Grunnurin er farin av knóranum og skyldar 321 mió. kr. Tað eru eingi útlit fyri, at nakar fær mistan pening aftur, og tað eru heldur ongar orsøkir til at halda, at møgulig sek hava møguleika fyri at endurgjalda mistan pening. Í besta føri metir minnilutin, at ein frágreiðing frá slíkari kanning fer at útpeika, hvat gekk galið, men hetta vita tey flestu helst frammanundan.

Harumfram hevur **Bill Justinussen og Jørgen Niclasen** hesar viðmerkingar:

6.37.2.04. Endurgjald til skipasmíð
Tað er óskiljandi, at ætlanin er at strika hesa játtan, sum er við til at skapa virksemi og kappingarføri í privatu vinnuni. Fyri lutfalsliga lítla játtan er landið við til at halda eini vinnu við nógvum størvum uppi. Landsstýrismaðurin hevur ikki í uppskotinum greitt Løgtinginum frá øllum viðurskiftum í sambandi við játtanina. Gjøgnum fjølmiðlarnar hevur nevndin fingið innlit í verkætlanir, sum sambært løgfrøðingum hava rætt til endurgjald, og má tí staðfestast, at eykajáttanaruppskotið er illa fyrireikað. Nevndin hevur síðani fingið skriv frá landsstýrismanninum, sum upplýsir um, hvussu nógvan pening landsstýrismaðurin eftir øllum at døma er bundin at gjalda út. Somuleiðis hevur nevndin fingið notat frá bátasmiðju, sum upplýsir um týdningin av játtanini. Vit eru í harðari og ójavnari kapping við grannalond okkara á hesum øki, og tí hevur landið einki val, um vit ikki vilja lata hesi arbeiðspláss fara fyri bakka.

7.23.2.01. Fólkaskúlin
Minnilutin hevur trupult við at skilja, hvussu játtanin til fólkaskúlan verður nýtt. Síðani 2007 er játtanin til fólkaskúlan hækkað við 42 mió. kr. Í sama tíðarskeiði er talið av lærarum hækkað við 11 og talið av næmingum er **lækkað** við 394 næmingum úr 7.260 niður í 6.866. Hjálagt er avrit úr fíggjarlógini.

Minnilutin heldur ikki, at tað er møguligt at játta meir pening til fólkaskúlan undir hesum umstøðum.

20.52.2.15. Avgjald á fiskatilfeingi
Annstøðan eigur ikki lut í makrelsemjuni, sum ein dominerandi minniluti hevur gjørt. Minnilutin tekur undir við at skipa fiskiveiðu á burðardyggum grundarlagi, men heldur ikki, at avgjald á fiskatilfeingi hevur nakað við hendan spurning at gera. At tyngja vinnulívið við fleiri avgjøldum er ikki gongda leiðin fyri at skapa vøkstur. Minnilutin heldur, at avgjaldið ikki hevur nakað við fiskivinnupolitikk at gera, men er heldur eitt hissini átak at skapa landskassanum skjóttvunnar inntøkur. Trupulleikin við slíkum avgjøldum er, at einki fordømi er um, at tey seinni verða tikin av. Vandin er heldur, at tey frameftir verða víðkað at galda fyri aðrar vinnubólkar, og vandin er somuleiðis, at eitt 25-oyra kann vaksa til 35 oyru, síðani 45 oyru osfr. við teirri kendu grundgevingini, at eitt 10-oyra kann ikki gera tann stóra skaðan.

Harumfram vísir minnilutin, **Eyðgunn Samuelsen og Annita á Fríðriksmørk**, á, at Løgtingið hevur við karmunum samtykt eina ætlan fyri at fáa burtur stóra undirskotið á fíggjarlógini. Minnilutin heldur eisini, at tað er av týdningi, at Løgtingið í mest møguligan mun heldur seg til at flyta frá lógarbundnum útreiðslum til vanligan rakstur. Tað fer við tíðini at økja munandi um raksturin, sum er óheppið í eini tíð, har miðað verður ímóti at koma einum stórum halli til lívs.

Minnilutin tekur undir við, at fólkaskúlin fær eina eykajáttan á 1,5 mió. kr. minnilutin heldur ikki, at tað kann koma upp á tal framhaldandi at lækka tímatalið í fólkaskúlanum. Støðan í fólkaskúlanum er tann, at sparingar eru framdar eftir eini tillagingarætlan, sum ikki er sett í verk. Tí ber ikki til at spara meira á fólkaskúlaøkinum.

Gigni, sum er heilsufrøði fyri børn og ung, varð skerd við 70 túsund krónum umframt, at eingin lønarframskriving varð givin fyri inniverandi ár. Fyri at sleppa undan uppsøgn á økinum, sum hevur stóran týdning fyri heilsuna hjá børnum og ungum kring landið, heldur minnilutin, at tað er neyðugt at játtað tað, sum biðið verður um. Harumframt fekk Gigni onga lønarframskriving, umframt at játtanin varð skerd við 70 túsund krónum.

**Fíggjarnevndin, 27. mai 2011**

| | | |
|---|---|---|
| Jørgen Niclasen<br>formaður | Eyðgunn Samuelsen<br>næstformaður | Bjørn Kalsø |
| Magni Laksáfoss | Bill Justinussen | Tórbjørn Jacobsen |

Annita á Fríðriksmørk